# Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 03.12.2018 |
| Mál nr.: | 17/00982 |
| Málsviðgjørt: | JN/MM/FP |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## virkið hjá kommunala musikkskúlaleiðaranum

Við heimild í § 9, stk. 5 í løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan verður ásett:

**§ 1.** Fyri tann einstaka musikkskúlan setir kommunan ein kommunalan musikkskúlaleiðara.
*Stk. 2.* Kommuna fevnir eisini um kommunal samstarvsøki, og tí kann ein kommunalur musikkskúlaleiðari røkja uppgávur í fleiri musikkskúlum ella tvørtur um kommunumark.

**§ 2.**Kommunali musikkskúlaleiðarin hevur dagligu leiðsluna av musikkskúlanum í kommununi.

**§ 3.**Kommunali musikkskúlaleiðarin hevur dagligu námsfrøðiligu ábyrgdina fyri tí virksemi, ið skipað verður í tí kommunala musikkskúlanum.

**§ 4.** Kommunali musikkskúlaleiðarin og musikkskúlastjórin eiga at vera í regluligum og skipaðum samskifti og samstarvi.

**§ 5.** Kommunali musikkskúlaleiðarin hevur tað dagliga samskiftið við musikkskúlalærararnar. Kommunali musikkskúlaleiðarin leiðir og fordeilir arbeiðið innanfyri tað lærarabýti, tímabýti og lærugreinabýti, ið musikkskúlastjórin hevur játtað kommunala musikkskúlanum.

**§ 6.** .Lærarar hava, hvat viðvíkur dagliga virkseminum, tilvísing til kommunala musikkskúlaleiðaran, sum leiðir og býtir arbeiðið.

**§ 7.** Kommunali musikkskúlaleiðarin skipar undirvísing á miðnámsstigi og á prelimineru orgulútbúgvingini, sum báðar enda við próvtøku. Musikkskúlastjórin skal góðkenna skipanina við royndum á orgulútbúgvingini og musikkskúlamiðnámsútbúgvingini.

**§ 8.** Kommunali musikkskúlaleiðarin ger leiðreglur viðvíkjandi upptøku, virksemi, trivnaði, skilhaldi og undirvísingaramboðum í kommunala musikkskúlanum.

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, xx. desember 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen